umborð

# Ring bara – og tú fært høvdið!

**Á seinasta túri hjá Vesturbúgvanum fingu teir henda velduga stóra kalvan, sum var 272 cm. langur og vigaði heili 440 pund. Norðfra í Norðdepli hevur keypt "risan", sum verður skorin til kotolettir og seldur á heimamarknaðinum í Føroyum. Allan Eysturskarð, sølumaður, sigur, at tann, sum ringir, fær høvdið til dyrnar, um væl ber til**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Kanska ikki so nógv ein av teimum mergjaðu umborð-greinunum við bæði nýggjum og søguligum innihaldi – og tó.

Vit gjørdu eina roynd í gjár at fáa fatur á manninum, sum stendur undir liðini á kalvanum, kvívíkinginum Jóhan Martin Thomasen, men tað eydnaðist ikki.

Fartelefonin hjá honum svaraði ikki. Hann kann hava staðið við kryvjipavnin júst í hesi løtu – ella hann kann hava fingið sær ein slang eftir langt tørn.

Jóhan Martin siglir við Vesturbúgvanum, sum á seinasta túri fekk henda velduga kalvan í trolið. Ikki heimsins størsti og neyvan heldur Føroya største, men stórur er hann. Tað skerst ikki burtur.

Og burtur skal hann ikki skerast...

Kalvin skal nevniliga skerast til kotolettir, sum verða seldar á føroyska heimamarknaðinum.

Tað var fiskavirkið Norðfra í Norðdepli, sum keypti kalvan fyri einar 11.000 krónur – ella fyri umleið 50 krónur fyri kilo.

- Vit fara at skera hann til kotolettir, sum verða pakkaðar í 3 kilo dósir. Síðan fara vit at bjóða kotolettirnar út til sølu á heimamarknaðinum.

Allan Eysturskarð, sølumaður hjá Norðfra, sigur, at stóri kalvin helst verður skorin sundur í trý ella fýra stykkir fyrst, og síðan fer hann í bandsagina hjá virkinum. Fiskurin verður skorin soleiðis í passalig stykkir, sum antin kunnu koyrast á pannuna ella í grýtuna.

- Vit royna í størst møguligan mun at hava kalva við í okkara útboði – ikki minst til heimamarknaðin, men tað gongur ikki altíð so væl at fáa fatur á kalva. Hetta er ein nokso dýrur fiskur, og tað er ikki so ofta, at nakrar serligar nøgdir eru á marknaðinum. Tí gerst kalvin eisini javnan uppi í okkara útboði.

Í sínari vøruskrá hevur Norðfra vanliga kalva sum flak.

Sølumaðurin sigur, at hóast hetta er ein stórur fiskur, so verður tað neyvan nakar trupulleiki hjá virkinum at sleppa av við allar tær mongu kotolettirnar, sum fáast burtur úr.

- Vit selja bæði til stovnar sum eitt nú eldrasambýlir, ellisheim, matstovur og aðrar køkar eisini - og ikki minst til privat fólk. So, hetta verður eingin trupulleiki.

Hann vísir á, at Norðfra koyrir eftir regluligari skipan út til viðskiftafólk í meginøkinum.

Vit spurdu eisini allan, hvussu verður við stóra høvdinum á kalvanum.

- Nei, tað veit eg ikki ordiliga, men eg kann frysta høvdið og goyma tað, um onkur skuldi havt áhuga fyri tí. Tað er bara at ringja – so kunnu vit koyra høvdið til dyrnar, um tað annars passar inn í okkara skipan við útkoyring.

Allan vísir á, at skal stóra kalvahøvdið kókast í einum, verður neyðugt við eini rættiliga stórari grýtu.

- Eg haldi meg ikki minnast, at vit nakrantíð hava keypt ein so stóran kalva áður, sigur sølumaðurin hjá Norðfra.

Kalvafiskur er forkunnugur og eftirspurdur matur.

- Tey, ið ynskja sær nakrar kotolettir av stóra kalvanum, eru vælkomin at seta seg í sambandi við okkum – ella at fara inn á okkara heimasíðu og bíleggja, sigur Allan Eysturskarð.



*- Tey, ið ynskja sær kotolettir av hesum stóra kalvanum, eru vælkomin at seta seg í sambandi við okkum – ella at fara inn á okkara heimasíðu og bíleggja, sigur Allan Eysturskarð, sølumaður hjá Norðfra í Norðdepli*

Um nøkur tøl finnast fyri, hvussu stórur hin størsti kalvin er, sum er veiddur í føroyskum sjógvi og landaður í Føroyum, vita vit ikki. Føroyingar hava ikki altíð verið teir bestu til hagtøl.

Menn munnu vita frá nógvum stórum kalvum at siga, og er tað onkur, ið eigur eina góða mynd at senda Sosialinum, eru fólk meira enn vælkomin at gera tað.

Størsti kalvi, sum norðmenn vita um er veiddur í norskum sjógvi, er kalvin, sum Tom Richard Kristiansen fekk í gørnum sínum í fjør heyst. Hesin risakalvi vigaði heili 629 pund, sum er 49 pund meira enn gamla metið í Noregi, sum var 580 pund.

Kalvin hjá Tom Richard varð máldur at vera tríggjar metrar langur og ein metur breiður.

Vit hava eisini frætt um ein annan stóran kalva, sum føroyskur skipari í Noregi, Hjalgrím Vestergaard av Tvøroyri, fekk í norskum sjógvi í 2001. Hann var tá skipari við norska skipinum Skjøtninberg.

Á tí eina túrinum fingu teir ein kalva, sum var 2,85 metrar langur, 1,36 breiður og 50 sentimetrar tjúkkur.

Teir skóru upp í seks kurvar av flaki - og haraftrat varð nógv koyrt burtur, sigst.

Kønir meta, at kalvin, sum føroyski skiparin fekk út fyri Tanafjørðinum í Noregi, hevur verið størri enn norska metið.

Hetta er tó ilt at siga, tá hesin ongantíð kom til lands og tískil ikki varð skrásettur nakrastaðni.

Kalvin hjá Hjalgrími Vestergaard var eitt sindur stytri, men munandi breiðari enn kalvin hjá Tom Richard Kristiansen.